## Brøndby var við í 80 minuttir

Eftir 2-1 sigur á heimavølli hevði danska Brøndby í 80 minuttir takið á týska Hertha Berlin. Í seinna dystinum millum liðini stóð nevnliga á jøvnum í steðginum, tá Morten Rasmussen eftir 50 minuttum beindi hornaspark í málið, sá alt so ljósareytt út hjá gula liðnum. Týska liðið vildi tað tó øðrvísi, og seinasta korterið skoraðu teir tríggjar ferðir, og so mátti Brøndby ásanna, at europiska ævintýrið hjá teimum er liðugt, longu áðrenn tað av álvara gjørdist stuttligt.




## OB trýsti Genoa

Á Fiona Park, sum í næstum kanska verður mest sum føroysk ogn, hevði OB gott tak á italska Genoa, sum hevði vunnið fyrra dystin teirra millum 3-1. Og tá Henrik Andreasen beint undan steðginum stútaði heimaliðið framum, kom av álvara lív í heimaáskoðararnar. Bara átta minuttir eftir steðgin eydnaðist tó Domenico Criscitos at javna, tá ein skotroynd frá honum varð avrættað, og so stóð mest sum greitt, at einasta danska luttøkan í Europa League verður tann hjá FCK, ið altso ikki slapp í heilt fína selskapið í meistarakappingini.

# Zlatan móti Inter

**Barcelona endaði í bólki við Inter, og eisini eru Real Madrid og Milan í sama bólki. Fleiri stórdystir eru á skránni í bólkaspælinum í Champions League**




Jákup Mørk

Tað vóru tey ensku liðini, sum fingu besta lutakastið, tá kúlurnar vórðu togaðar úr Champions League pottinum í gjár. Manchester United, Chelsea, Liverpool og Arsenal sluppu øll meira ella minni undan nøkrum europiskum stórfelagi í bólkaspælinum, har serstakliga áhugaverdar uppgerðir tó eru á skránni í fleiri øðrum bólkum.

Iikki minst er spenningurin stórur í bólki F, har Inter og Barcelona eru í sama bólki. Zlatan Ibrahimovic skifti í summar til Barcelona úr júst Inter, har hann í fleiri ár hevur verið stóri kult-figururin, meðan Samuel Eto'o fór øvutan veg, so á sín hátt verður tað ein uppgerð um, hvør av teimum báðum er vandamesti harrin á einum fótbóltsvølli.

Og í bólki C skal Kaka, sum nú er liðfelagi við Ronaldo í Real Madrid royna seg móti fyrrverandi felagi sínum, AC Milan, sum hann áður hevur vunnið Champions League kappingina við.

Og so slepst ikki undan at nevna, at tað við EB/Streyms-eygum verður áhugavert at síggja, hvussu tað spælir av, at Apoel Nicosia fer at vitja á víðagitnu heimavøllunum hjá Chelsea, Porto og Atletico Madrid.




**Zlatan Ibrahimovic varð stórliga fagnaður, tá hann í summar skrivaði undir sáttmála við Barcelona. Í gjár stóð greitt, at hann nú skal royna seg móti fyrrverandi liðfeløgunum í Inter í bólkaspælinum í Champions League**

## Bólkarnir

**Bólkur A:** Bayern Munchen, Juventus, Bordeaux, Maccabi Haifa.
**Bólkur B:** Manchester United, CSKA Moskva, Besiktar, Wolfsburg.
**Bólkur C:** AC Milan, Real Madrid, Marseille, Zurich.
**Bólkur D:** Chelsea, Porto, Atletico Madrid, Apoel Nicosia
**Bólkur E:** Liverpool, Lyon, Fiorentina, Debrecini
**Bólkur F:** Barcelona, Inter, Dynami Kiev, Rubin Kazan.
**Bólkur G:** Sevilla, Rangers, Stuttgart, Unirea Urziceni.
**Bólkur H:** Arsenal, Alkmaar, Olympiakos, Standard Liege.

## Dystir um vikuskiftið

**Vodafone-deildin**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 30.08 | HB-Víkingur | Dagfinn Olsen |
| 30.08 | KÍ-AB | Rúni Gaardbo |
| 30.08 | 07 Vestur-B36 | Petur Reinert |
| 30.08 | B68-ÍF | Ransin N. Djurhuus |
| 31.08 | EB/S-NSÍ | Bárður Mortensen |

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 29.08 | VB/S-NSÍ | Alex Troleis |
| 29.08 | Víkingur-FC Hoyvík | Birgir Sondum |
| 29.08 | B71-B68 | Bent T. Linklett |
| 29.08 | Skála-HB | Jón Kári í Brekkuni |
| 30.08 | TB-MB | Alex Troleis |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 30.08 | Víkingur-B36 | Verner Hentza |
| 30.08 | ÍF-AB | Kári J. á Høvdanum |
| 30.08 | KÍ-Undri | Bogi Joensen |
| 30.08 | TB-07 Vestur | Jákup M. Kjell |

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 21 | 14 - 5 - 2 | 50 | 27 | 23 | 47 |
| 2 EB/S | 21 | 11 - 4 - 6 | 42 | 26 | 16 | 37 |
| 3 NSÍ | 21 | 10 - 4 - 7 | 44 | 35 | 9 | 34 |
| 4 Víkingur | 21 | 10 - 4 - 7 | 39 | 30 | 9 | 34 |
| 5 B68 | 21 | 9 - 6 - 6 | 38 | 35 | 3 | 33 |
| 6 AB | 21 | 8 - 5 - 8 | 24 | 25 | -1 | 29 |
| 7 ÍF | 21 | 6 - 5 - 10 | 30 | 35 | -5 | 23 |
| 8 B36 | 21 | 5 - 6 - 10 | 26 | 40 | -14 | 21 |
| 9 KÍ | 21 | 4 - 5 - 12 | 24 | 44 | -20 | 17 |
| 10 07 Vestur | 21 | 3 - 6 - 12 | 31 | 51 | -20 | 15 |

**Formbarometrið**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 AB | 6 | 4 - 1 - 1 | 12 | 4 | 8 | 13 |
| 2 HB | 6 | 4 - 1 - 1 | 11 | 5 | 6 | 13 |
| 3 EB/S | 6 | 4 - 0 - 2 | 10 | 7 | 3 | 12 |
| 4 NSÍ | 6 | 3 - 1 - 2 | 13 | 10 | 3 | 10 |
| 5 ÍF | 6 | 2 - 2 - 2 | 10 | 12 | -2 | 8 |
| 6 Víkingur | 6 | 2 - 1 - 3 | 10 | 11 | -1 | 7 |
| 7 07 Vestur | 6 | 2 - 1 - 3 | 10 | 12 | -2 | 7 |
| 8 KÍ | 6 | 2 - 0 - 4 | 7 | 16 | -9 | 6 |
| 9 B68 | 6 | 1 - 2 - 3 | 6 | 10 | -4 | 5 |
| 10 B36 | 6 | 1 - 1 - 4 | 6 | 12 | -6 | 4 |

**1. deild, menn**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB/S | 20 | 12 - 4 - 4 | 46 | 35 | 11 | 40 |
| 2 HB | 20 | 10 - 5 - 5 | 43 | 28 | 15 | 35 |
| 3 B71 | 20 | 10 - 5 - 5 | 42 | 30 | 12 | 35 |
| 4 TB | 20 | 10 - 5 - 5 | 41 | 34 | 7 | 35 |
| 5 B68 | 20 | 8 - 4 - 8 | 49 | 39 | 10 | 28 |
| 6 NSÍ | 20 | 8 - 4 - 8 | 38 | 40 | -2 | 28 |
| 7 FC Hoyvík | 20 | 9 - 1 - 10 | 27 | 33 | -6 | 28 |
| 8 Víkingur | 20 | 6 - 6 - 8 | 30 | 31 | -1 | 24 |
| 9 Skála | 20 | 5 - 4 - 11 | 24 | 32 | -8 | 19 |
| 10 MB | 20 | 2 - 2 - 16 | 24 | 62 | -38 | 8 |

**1. deild, kvinnur**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 KÍ | 16 | 13 - 2 - 1 | 75 | 6 | 69 | 41 |
| 2 AB | 16 | 13 - 2 - 1 | 41 | 6 | 35 | 41 |
| 3 Víkingur | 16 | 9 - 3 - 3 | 35 | 19 | 16 | 30 |
| 4 Skála | 16 | 5 - 1 - 4 | 19 | 43 | -24 | 16 |
| 5 EB/Streymur | 16 | 2 - 1 - 13 | 8 | 56 | -48 | 7 |
| 6 B68/NSÍ | 16 | 1 - 1 - 14 | 5 | 56 | -51 | 4 |